# 2005

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – EB/Streymur

**FORMULADEILDIN**

**Sunnudagin 22. mai 2005  Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

formuladeildin

TOYOTA  MIKLAGARÐUR  P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 4 2005**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Rógvi Róin
Sosialurin

**Kápumynd**
ÍF leikararnir gera seg klárar at leypa upp í hornasparksinnlegg frá Gunnari. Myndin er frá dystinum móti TB í Fuglafirði 1. mai.
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

## TAÐ HALDA VIT
# ... Á BAKKANUM!

Nógv er broytt, síðani grønu teigarnir niðanfyri Inndalsvegin í Fløtugerði máttu lúta, og gjørdust til skráning og hyll, fyri at fótbóltsvøllurin skuldi standa kravdu mát. Væl vóru teigarnir grønir um sumrarnar, men neyvan fingu ognarmenninir ella knæbóndirnir serliga nógv hoyggj, tí hvørt einasta vikuskifti váláðu fleiri hundrað fólk frá vegnum og oman á bakkan at hyggja eftir fótbólti, so tað sum ikki bleiv traðkað niður á veg oman, tað mundi fara, tá fólk fóru niðanaftur.

Omanfyri eystara enda á vøllinum var svimjihylur í Skarðsá, júst sum hann stendur har í dag. Munurin er bara, at tá var vatn í honum. Ikki so sjáldan kom tað fyri, at leikarar eftir loknan dyst runnu niðan í hylin, kavaðu og svumu eitt sindur, til teir væl køldir kundu ragga oman í skúlan ella aðrastaðni at skifta klæðir.

Til stórar dystir stóðu fólk nærsagt á hvørjum tanga á bakkanum, og stemningurin var ofta ógvuliga inniligur, tí áskoðararnir stóðu so nær við. Niðri við vøllin var loyvt at standa á síðulinjuni og mállinjuni heilt inn til málstengurnar, og tað varð ikki roknað sum givið, at ein mátti flyta seg meðan t.d. innkast varð tveitt og málspark skotið.

Bøurin, ið er upprunin til "vendingina" á Bakkanum, er nú burtur og gloymdur, men minnini liva.

Um onkur heldur, at talan var um slættan bø niðan móti vegnum, so fer hann skeivur. Nei, væl var tað gangandi allastaðni, men teigarnir vóru smalir, nógvar rennur vóru, og norðuri við eystara brotsteig var stórt gil, har genturnar vóru vanar at skifta um sumrarnar, meðan dreingirnir ikki høvdu so nógv hóvasták, men háláðu svimjibuksurnar uppá í einari rennu ella aftanfyri turkilagið hjá Hálvdan.

Skuldi onkur ivast, so kunnu vit leggja aftrat, at bøurin og Bakkin hvurvu sama árið sum ÍF endaði á ovastu rók í føroysku landskappingini; so kunnu tit gita nær tað var. Vit halda, at nú er tíð uppá, at okkara lið aftur fer at vinna, og teljast millum tey bestu, so lív aftur verður á hillini og uppi á vegnum, sum tað var í gomlu døgum, tá tað kallaðist á Bakkanum. Góðan dyst






Dysturin í dag er ímóti EB/Streymi. Navnið EB er eitt vælkent navn í Fuglafirði. Eitt lið, ið spældi mangan dystin í Fuglafirði, eins og fuglfirðingar spældu norðuri á Mølini á Eiði. Talan varð bæði um fótbólt og hondbólt. Vinalagið millum hesar bygdir var stórt og hevur vart dagin í dag.

Eiðisfólk hava verið ítróttini góð, tí fáar staðir eru so góðar umstøður skaptar fyri ítróttini, sum á Eiði. Nýggjan graslíkisvøll, nýggja tíðarhóskandi ítróttarhøll, ja har er so at siga alt tað, ið ítróttarfólk kunnu ynskja sær.

Fyri nú nøkrum árum síðani varð avrátt, at EB og Streymur skuldu leggjast saman í eitt felag við navninum EB/Streymur, fyrst og fremst við tí endamáli, at gera tað møguligt at taka lut í bestu deildini í fótbólti. Eftir okkara tykki ein skilagóð avgerð. EB/Streymur hava nú tikið lut í bestu deildini í nøkur ár og væl hevur vignast.

Ì dag vitjar so EB/Streymur okkum, og vit fara at bjóða teimum at vera vælkomnar til Fuglafjørð. Liðið hevur staðið seg rættiliga væl í ár, liggja á miðjuni í kappingini við 10 stigum, meðan fuglfirðingar hava fingið 12 stig, – tvey rættiliga jøvn lið.

ÍF hevur vitjað EB/Streym á Mølini á Eiði í ár, og endaði tann landskappingardysturin við 2-2, sum av ítróttarskrivarum, varð mett sum eitt rættvíst úrslit.

Mánadagin, 2. hvítusunnudag, hevði EB/Streymur vitjan av vágbingum. Nógv bendi á, at VB fór avstað við sigrinum, men í síðstu løtu eydnaðist tað EB/Streymi at javna, so teir fingu tað

**Framhald á bls. 5**

















**Framhald frá bls. 3**

eina stigið og komu uppá 10 stig.

Vinnur EB/Streymur á ÍF, ja so fara teir fram um okkum við einum stigi. EB/Streymur er eitt lið við stórum stríðsvilja, so teir fara at leggja alla sína orku í at vinnan dystin í dag.

ÍF hevur havt nøkur stórtap í seinastuni, ið teir ikki tola nógv av afturat, tí fara allir ÍF-leikararnir fullhugaðir inn á vøllin til henda dystin, og vinna teir, ja so eru møguleikar fyri at koma upp á eitt 4. ella 3. pláss aftur, sjálvsagt alt eftir, hvussu hini úrslitini laga seg í dag og morgin.

Vit vænta, at ÍF–liðið verður nakað tað sama sum seinast. Bartal, ið ikki var til seinasta dystin, verður aftur á liðnum í dag. Venjarar og spælarar ÍF´s hava sjálvandi umrøtt dystin móti klaksvíkingum 2. hvítusunnudag væl og virðiliga, og fara hesaferð ikki at gera somu mistøk, sum teir tá gjørdu.

Fuglfirðingar fara inn á vøllin fullhugaðir, og hesaferð fer tað at eydnast teimum at fáa øll trý stigini til høldar.

Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

fk

Fuglafjarðar
Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

FAXE KONDI



## MEINING SIGNAR Á BRÚNNI SKRIVAR

# SJÁLVRANNSAKAN



ÍF byrjaði væl í landskappingini í ár. – Vunnu teir nógvu dystirnar og spældu nakrar javnleikir, við tí úrsliti, at ÍF lá millum fremstu liðini á stigatalvuni. Allir fuglfirðingar fegnaðust – økta áskoðaratalið í Fuglafirði til heimadystirnar prógvaði tað.

Men so brádliga kom stígur í. – Úrslit, ið eingin hevði væntað, gjørdust veruleiki, og ÍF liðið er nú dottið nógv niður á stigatalvuni, frá triðja plássi niður á sætta pláss. Eitt er at tapa við einum ella tveimum málum, men at tapa heili 6-0 móti liðið, ið vit vunnu á fyri fjúrtan døgum síðani í Havn, kann ikki vera rætt – okkurt er spinnandi galið.

Frásøgumaður útvarpsins segði millum annað, at okkara lið spældi betri fótbólt enn HB í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki fall okkara lið í fátt, og var ikki at kenna aftur. Onkur helt fyri, at hetta var ein av okkara gráu døgum, ið vit bert skuldu gloyma og leggja aftur um okkum.

Men teir gráu dagarnir halda fram. KÍ–liðið, ið vit nevndu kreppulið í okkara seinasta blaði, hølvaði okkara lið av, 0-3. KÍ–liðið var eftir okkara tykki ikki nakað sterkt lið. – Eitt lið, ið vit áttu at havt vunnið við tí góða tilfari, ið vit hava í okkara liði. Tí eru mong okkara, sum spyrja: Hvat er tað, sum bagir? Hvussu kann eitt lið broytast so brádliga, frá at hugtaka allar áskoðararnar fyri gott spæl, til at spæla sum eitt lið í vánaligastu deildini? Hvussu kann okkara lið tapa 9 – 0 í tveimum dystum? Haltar moralurin á liðnum ella ... ?

Venjararnir báðir, Petur og Sonni, mugu leggja høvdini í blot, fyri at finna út av, hvør orsøkin er til vánaligu úrslitini í seinastuni, fyri síðani at koma við loysnum, ið skapa vend í.

Nevnd ÍF´s, saman við stuðulsfelagnum, eigur somuleiðis at umrøða kreppustøðuna, ið felagið er um at koma sær útí, so skeiva gongdin verður steðgað nóg tíðliga og ÌF-liðið verður aftur tað liðið, ið vit sóu fyrsta partin av kappingini.

Samanumtikið halda vit, at vit eiga góðar leikarar, og verður rætt skipað fyri, so eigur liðið at liggja millum fremstu liðini, tá kappingin er lokin.

# LEIKARIN HESA FERÐ POUL ENNIGARÐ



**TÚ**

**Navn:** Poul Ennigarð
**Føðingardagur:** 29-07-1977
**Starv:** Gøtu Fiskavirki
**Hædd og vekt:** 187 cm og 82 kg.
**Størsta styrki:** At lesa spælið
**Størsti veikleikI:** Luft-spælið
**Torførast mótstøðu-maður:** Havi ikki møtt honum enn
**Frítíðarítriv:** Pool og poker
**Vónir fyri 2005:** The double

**TÍN ÍTRÓTT**

**Pláss á vøllinum:** Miðja/verja
**Fyrsti dystur á 1. liði:** Fyrsta dyst í landskappingini í 1994
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Fyrsta dyst í steypakappingini í ár. Úti móti VB
**Aðrar ítróttargreinar:** Pool og poker
**Minningarríkasti dystur:** KÍ vs GÍ í 1994. Vunnu FM í yvirtíðini
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Jóhan Nielsen
**Besti fótbóltsleikari: í løtuni:** Frank Lampard
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Golf
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Interval
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Venjing uttan bólt
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Buffon
– Thuram, Nesta Terry, Cole – Gerrard, Lampard, Nedved
– Ronaldinho
– Adriano og Henry.
(4:3:1:2)

**TÍNIR FAVORITTAR**

**Matur og drekka:** Føroyskan mat/Faxe Kondi
**Besta árið og hví:** 1984 – tá bleiv Miriam fødd
**Slag av tónleiki:** Bleytan rock
**Besta sending í SvF:** 3-2
**Besti filmur:** Lord of the Rings 1,2, og 3
**At slappa av:** Hyggja eftir einum góðum filmi
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Maradona
**Stuttligasi persónur:** Atli Petersen
**Sjónvarp/filmstjørna:** Sean Penn
**Sangari/sangarinna:** Elton John
**Besta bók/blað:** Tað má vera ÍF-blaðið, he he …







Tilfar til umvælingar,
ábøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!

Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126




KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.



- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar



KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




Landsins **størsta** og besta úrval



*gravering íroknað prísin*

**EILIF ARGE** FA
Tel. 455164 · Fax 457576 · faeilifarge@post.olivant.fo



**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
v/ Glenn Perdomo

Undir Krákugjógv 5 Kj.,
Tórshavn tel 321778

## KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI
INFORMATION OFFICE

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

## FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |




Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

**formula**deildin



í altjóða kapping....

**formula.fo**



HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

**Lastvognskoyring**



Øll lastvognskoyring
verður gjørd

**Kári Zachariassen**

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245

BERGFROST
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com



# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo



**Rasmus Joensen**

Málarameistari

530 Fuglafjørður

Tel. 444 139 - 214139

**SANDGREVSTUR P/F**
Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

Koyring við kranalastvognum
fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)

tel 444121 • 595900 • 595910



Tannlæknastovan

Steintór Larsen | tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge | tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 | 530 Fuglafjørður | tel. 444 358

Vit
hava
útgerðina



VÓNIN
www.vonin.com




Fysioterapiviðgerðarstova

Ítróttarhjálparútgerð við lágum prísum: t.d. tape, eingangs ís-posar og 1. hjálpar-/ "Læknataskur"

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur











LEVI'S® RED TAB® JEANS



Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon

VØRDSLAN
WEARHOUSE

Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47





AVENSIS

TOYOTA



**Avensis**
Einastandandi dygd og koyrigleði.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

VR BILAR

VOLVO

RENAULT







Teir nýggju Volvo S40 og V50
Prísir úr **276.000**

**VR-Bilar**

Hoyvíksvegur 61
FO-100 Tórshavn
tel 32 21 10
telefax 32 21 11
vr-bilar@vr-bilar.fo

Vit umboða eisini Volvo lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur

**Opið er soleiðis:**
mánadag til fríggjadag: 08.00-17.00






Eftir dystin bjóðar Shell ókeypis **Slush-ice** til børnini!




Tilboðið er galdandi hvønn sunnudag ímeðan kappingin er í gongd

www.shell.fo

Shell-støðin í Gøtudali

AP BUSSKOYRING

V/ Andreas Poulsen

fartel 505220 • 441720

Piddasahandil og Ribarhús

listaframsýningar

heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir

føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál

føroyskar fløgur

loppumarknaður

- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«

opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30

ley. 11.00 - 13.00

annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27



hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði

# Alt innan bátaútgerð



VOLVO PENTA



GPS-plottarar og sjálvstýrarar frá Cetrek

Bátatænastan

Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn

Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo

www.batataenastan.fo



**Góðskan á arbeiðnum altavgerandi**

Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar

# JLJ-Bygging

**Verkfrøði og húsasmíð**

690 Oyndarfjørður | tel 21 47 87 & 44 47 87 | t-postur: jljuul@post.olivant.fo








Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**
**v/ Hans J. Kollsker**







Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00



**Jørleif Petersen**
*málarameistari*
Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!

Sp/f **Jan Mohr**
**Byggivirkið**

**Tlf: 21 99 49 • 21 89 49**


Hugsar tú um at byggja?
Tosa fyrst við okkum!
Her fært tú altíð eitt gott tilboð
Element-& Betongvøruvirkið
við Gjógv
Tlf. 423173-445173


Hugsa tygum um útskifting ella nýbygging?
- royn okkum!
Vel snið, træsort og viðgerð
Send okkum uppskot
og vit geva tilboð
innan allar seruppgávur
Handverkið ger munin
TRÆSMIÐJAN
317166 GLT
Tórshavn • Tlf. 317166 Faks 318131 • Teldupostur: tra-glt@post.olivant.fo


døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50


Jolly ®


Hann ger tað ikki lættari at minnast kotuna á bensinkortinum
Tann nýggi Suzuki Alto
koyrir í meðal 20,4 km.
uppá liturin
Hann kostar bert:
Kr. 99.990,-
koyriklárur
Suzuki Alto er harafturat fyltur við útgerð so sum powerstýring,
dupult airbags, ABS-bremsum, sentrallás, el-rútum
SUZUKI Berg Motors SUZUKI
Staravegur 1-3, box 1039, 110 Tórshavn - Tlf 313535 Fax 317735

KLAKSVÍKAR
AUTOLAKERING

BUMSHAMAR • 700 KLAKSVÍK • TLF. 458787 • FART. 223512 & 223513

Timbur-, betong-
og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið SpF
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56

POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95





P/F Petur Larsen
Mekaniskur verkstaður
postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco
















## OGNA TÆR EINA ÍF DRAKT

Nú eru ÍF-draktir aftur at fáa.
og eru tær at fáa í øllum støddum, eisini til vaksin.

Prísur:
Vaksin: Einans 650,- kr
Børn: Einans 550,- kr
Draktirnar fáast til keyps í Piddasa handli, sum er opin hesar tíðir:
Mánadag-fríggjadag: 15.00-17.00
Leygardag 11.00-13.00



Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

Úrvalsbilar SpF
v/ Magnus Onghamar

Bakkavegur 530 Fuglafjørður tel 444 943 fax 444 638

Rasmussen & Weihe P/f
statsaut. grannskoðarafelag

Heiðavegur • P.O. Box 154 • FO-600 Saltangará
tel 35 17 00 • fax 47 17 01
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

International: An associate firm of **PricewaterhouseCoopers**

P/F Grannskoðaravirkið
INPACT
Statsaut. revisorar

R. C. Effersøesg. 26, Tórshavn
Tel +298 31 47 00
Fax +298 31 38 15
inpact@inpact.fo
www.inpact.fo

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

HER SÆRT TÚ, HVÍ TANN NÝGGI NISSAN ALMERA EITUR DELTA TIL EFTIRNAVN




Bilurin á myndini hevur eykaútgerð. Brennievnisnýtsla við blandaðari koyring: 14,9 km/l, CO2 útlát 160 g/km

**DELTA MERKIR ØKING.** Og tað kann veruliga ikki fáast meiri útgerð í Almera Delta. Hóast hetta kostar Almera Delta 1.8 við 5 hurðum bara **189.000,- kr.**

**3 ára** mekaniskt garanti.
**3 ára** lakk garanti.
**12 ára** garanti ímóti gjøgnumtering

NISSAN

P/F Meinhardt Arge
Tel 345400 • www.bilarge.fo

BOCCA / petur & petur • 320870

## Tips 13 úr leikskránni

Undirtøkan fyri TIPS 13 kappingini í ár hevur verið syndarliga lítil. Tí hava vit avgjørt at gevast við táttinum, sum í fjør var ógvuliga vælumtóktur millum lesararnar á Bakkanum. Í skrivandi løtu er ikki greitt, um tátturin kemur í blaðið aftur í ár. Vit bíða og vita, um áskoðararnir og lesararnir annars sakna táttin, og ynskja vit tí fegnir tykkara meining.

Teir báðir Arnar og Jóhan, sum hava vunnið ávíkavist 1. og 2. umfar av kappingini verða ikki við sviðusoð. Aftaná á kappingarlok verður sum lovað drigið um flogferðaseðilin frá Atlantic Airways.

## Lítla sølubúðin í ítróttarhúsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjaran fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin. So verið vælkomin øll somul.

## 1000,00 krónur ístaðin fyri ferðaseðil

Síðsta ár fór fótbóltsnevndin undir ein forkunnugan tátt, at fáa til vega fleiri pengar til rakstur av yngru deildunum. – Stig varð nevnliga tikið til at selja tennisbóltur meðan 1. deild spældi. Í hálvleikinum skulu tennisbóltarnir, sum eru talmerktir, kastast út móti miðjuni á vøllinum. Tann bólturin, sum liggur næst miðjuni tá ið øll hava kastað, vann ein flogferðaseðil. Tiltakið eydnaðist somikið væl, at fótbóltsnevndin hevur valt at halda fram við tiltakinum í ár. Tiltakið er eisini lýst í leikskránni, men av misgávum er lýst við, at tann, sum eigur tann bóltin, sum liggur næstur miðjuni, vinnur ein flogferðaseðil. Hetta er skeivt, tí í staðin fyri at vinna ein flogferðaseðil, hevur fótbóltsnevndin avgjørt, at vinnarin vinnur 1000,00 kontantar krónur, sum verða goldnar vinnararnum beinanvegin eftir dagsins dyst. Vit vóna tit umbera mistakið, og taka væl ímóti hesum serliga og øðrvísi eydnuspælinum.






# Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil.
Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.
Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum,
vinnur Apex-flogferðaseðilin.

## Kostnaður 30,-

ATLANTIC AIRWAYS

# ÁRSINS ÍF-ARI 2005

## Símun bestur ímóti KÍ

Í tapinum í móti KÍ 2. hvítusunnudag, komu ikki serliga nógvir atkvøðuseðlar inn. Áskoðarnir valdu Símun, sum fyri fyrstu ferð í ár, spældi í verjuni, at vera besta leikaran á vøllinum. Hann fekk íalt 40 atkvøður, meðan Eyðolvur fekk 30 á 2. plássi.

Fyri at verða besti leikarin fær Símun ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Símun | 41 | 60 |
| Eyðolvur | 30 | 76 |
| Høgni | 12 | 36 |
| Gunnar | 10 | 90 |
| Sylla | 8 | 35 |
| Atli | 8 | 8 |
| Hanus | 6 | 10 |

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

fk

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-EB/Streymur, 22. mai 2005

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ______

Nr 2 (3 stig) ______

Nr 3 (2 stig) ______

Veljari / tel: ______



## STØÐAN FORMULADEILDIN - 17. MAI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | B36 | 9 | 5 | 3 | 1 | 12 - 3 | 18 | 3 - 1 - 1 | 2 - 2 - 0 |
| 2. | HB (m) | 9 | 5 | 1 | 3 | 24 -12 | 16 | 5 - 0 - 0 | 0 - 1 - 3 |
| 3. | NSÍ | 9 | 4 | 4 | 1 | 15 - 9 | 16 | 2 - 2 - 0 | 2 - 2 - 1 |
| 4. | Skála | 9 | 4 | 3 | 2 | 18 -12 | 15 | 2 - 2 - 1 | 2 - 1 - 1 |
| 5. | ÍF | 9 | 3 | 3 | 3 | 12 -20 | 12 | 2 - 0 - 2 | 1 - 3 - 1 |
| 6. | TB (u) | 9 | 3 | 3 | 3 | 10 -10 | 12 | 2 - 2 - 0 | 1 - 1 - 3 |
| 7. | KÍ | 9 | 3 | 2 | 4 | 13 -13 | 11 | 1 - 0 - 3 | 2 - 2 - 1 |
| 8. | EB/Str. | 9 | 2 | 4 | 3 | 8 -14 | 10 | 0 - 4 - 0 | 2 - 0 - 3 |
| 9. | VB | 9 | 2 | 2 | 5 | 5 -13 | 8 | 1 - 1 - 4 | 1 - 1 - 1 |
| 10. | GÍ | 9 | 1 | 1 | 7 | 9 -20 | 4 | 0 - 1 - 3 | 1 - 0 - 4 |

## LEIKARAHAGTØL FORMULADEILDIN 2005

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Joensen | 759 | 9 | 1 | - | (3) | - | (16) | 61 |
| 2 | Áki Petersen | 20 | 2 | - | 2 | - | - | - | - |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | - - | - | - | - | - | - | - | |
| 5 | Poul Ennigarð | 810 | 9 | - | - | - | - | 1 | 30 |
| 6 | Bartal Eliasen | 554 | 8 | - | 2 | 1 | - | - | 28 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 28 | 3 | - | 3 | - | - | - | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 598 | 8 | 3 | 1 | 2 | - | - | 2 |
| 9 | Atli Petersen | 88 | 4 | - | 7 | - | - | 1 | 8 |
| 10 | Hanus Eliasen | 504 | 8 | 2 | 2 | - | - | - | 10 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 630 | 7 | - | - | - | - | - | 76 |
| 12 | Gunnar Nielsen | 710 | 9 | 4 | 1 | 1 | - | 2 | 90 |
| 13 | Roy Róin | 25 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 16 | Emil Toftegaard | 51 | 1 | - | 1 | - | - | (1) | - |
| 17 | Høgni Zachariassen | 810 | 9 | - | - | 1 | - | 2 | 36 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 633 | 8 | 6 | - | 1 | - | 2 | 28 |
| 19 | Frank Poulsen | 90 | 1 | - | - | - | - | - | - |
| 20 | Sylla Amed Davy | 661 | 9 | 5 | 1 | 1 | - | 1 | 35 |
| 21 | Jonn Sólheim Thomsen | 552 | 7 | 1 | - | 3 | - | - | 7 |
| 28 | Magni á Lakjuni | 577 | 9 | 3 | 4 | - | - | 2 | 25 |
| 30 | Símun Eliasen | 810 | 9 | - | - | 4 | - | 1 | 60 |

***FRÁGREIÐING:*** *D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í Formuladeildini í dag - 10. umfar**
VB - GÍ
KÍ - TB
Skála – B36
HB – NSÍ (spældur mánadagin 23. mai)

**Dystir í Formuladeildini sunnudagin 29. mai – 11. umfar**
Skála - VB
B36 - NSÍ
TB - HB
EB/Streymur - KÍ
GÍ - ÍF

**Dystir í 3. deild sunnudagin 22. mai – 4. umfar**
B68 – EB/Streymur
ÍF – Skála
SÍ – Fram
HB – NSÍ
KÍ - VB

**Málskjúttar formuladeildin**

| | |
|---|---|
| Tór Ingar Akselsen, HB | 5 |
| Jónhard Fredriksberg, Skála | 5 |
| Súni Olsen, GÍ | 5 |
| Christian H. Jacobsen, NSÍ | 5 |
| Hans á Lag, HB | 4 |
| Bogi Gregersen, Skála | 4 |
| Rúni Nolsøe, HB | 4 |
| Óli Johannesen, TB | 4 |
| Allan Mørkøre, B36 | 4 |
| Jákup á Borg, HB | 4 |

### VERT AT VITA

Dysturin í dag ímóti felagsliðnum í Sundalagnum er 10. landskappingardysturin í ár. Tað merkir, at vit longu hava spælt meira enn 1/3 av landskappingini í ár.

Komandi sunnudag verður grannauppgerð í Gøtu, tá ið vit skulu út um Eiðið. Aftaná tann dystin er steðgur í kappingini, tí at A-landsliðið spælir 2 dystir í HM-undankappingini. Tann fyrri dysturin er leygardagin 4. juni á Toftum ímóti Sveis, meðan seinni dysturin er mikudagin 8. juni á Tórsvølli móti Írlandi. Næsti heimadystur verður sunnudagin 12. juni ímóti Skála.

3.deildarliðið hjá okkum spælir í dag heima ímóti Skála. Sunnudagin 29. mai spæla teir ímóti Fram í Havn.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1. Allan Joensen
2. Áki Petersen
3. Sverri Ellingsgaard
5. Poul Ennigarð
6. Bartal Eliasen (liðsk.)
8. Fritleif í Lambanum
9. Atli Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R.-Petersen
12. Gunnar G. Nielsen
16. Emil Toftegaard
17. Høgni Zachariassen
18. Rúni Ey. Elttør
19. Frank Poulsen
20. Sylla Amed Davy
28. Magni á Lakjuni
30. Símun Eliasen

**Venjari:**
Petur Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Sonni Jensen
**Liðleiðarar:**
Høgni á Lakjuni
Símun Fornagarð
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## EB/S-LIÐIÐ

1. Gunnar á Steig
4. Esmar Eiðiskarð
5. Knút Vesturtún
6. Andrej Pacek
7. Marni Djurhuus
8. Jákup Martin Joensen
9. Teitur Joensen
10. Sorin Anghel
11. Hans Pauli Samuelsen
12. Jóhan á Stongunum
13. Ólavur Poulsen
14. Leif Niclasen
15. Bárður Olsen
16. Johan Birgir Dahl-Olsen
17. Sonni L. Petersen
19. Egil á Bø (liðsk.)
21. Gert Hansen
22. Fróði Clementsen

**Venjari**
Piotr Krakowsaki
**Liðleiðarar**
Jón Láadal
Ólavur Høghamar

formuladeildin



**PÁLL AUGUSTINUSSEN**
**Rúni og Jens A.**

**PETUR ABRAHAMSEN**